# Deildarstjóri til Tryggingina

**Eitt sera spennandi starv sum stjóri fyri alt privatøkið hjá Tryggingarfelagnum Føroyum er leyst at søkja.**

Á privatøkinum, sum er størsta virkisøkið hjá felagnum, liggur ein krevjandi og avbjóðandi uppgáva og bíðar eftir tær. Henda uppgáva fevnir m.a. um at greina marknaðin, menna og tillaga produktini til tørvin og at tryggja, saman við tínum starvsfólki, at allir okkara privatkundar fáa betri tænastur.

Tú hevur 50 fólk á tínari deild, og tí er umráðandi, at tú ert ein góður leiðari og fært tað besta fram í fólki.

Umframt at hava leiðsluroyndir krevst til starvið, at tú hevur góð analytisk evni, og tú megnar at seta strategiskar ætlanir út í kortið. Tú kemur at arbeiða í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi. Tú vísir beinleiðis til varastjóran. Vit bjóða góða løn og góðar setanartreytir.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Edvard Heen, varastjóra, telefon 345501 ella eh@trygging.fo

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 30. oktober.

Send umsóknina til:
Tryggingarfelagið Føroyar,
Starvsfólkadeildin, Postsmoga 329,
FO-100 Tórshavn ella
starvsfolkadeild@trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*